# Ein rík norsk kommuna



Norska kommunan Aukra er sambært blaðnum Fiskeribladet Fiskaren so rík, at bara ognarskattur tryggjar kommununi eina inntøku upp á 132 miljónir norskar krónur. Sum skilst, veit kommunan snøgt sagt ikki, hvat hon skal brúka pengarnar til. Tað er í fyrsta lagi virksemið hjá Orminum Langa, sum tryggjar norsku kommununi stóru inntøkurnar – í fleiri ár fram í tíðina.

# Seldi villa fyri 582 krónur

Forstjórin í Lehman Brothers, Richard Fuld, hevur skapt nýggja øsing um sín persón og arbeiðsplássið, har hann var forstjóri og sum nú er kollsiglt. Fuld hevur fingið skuldina fyri, at bankin fór á heysin, og umvegis sakførara sín tekur hann fulla ábyrgd. Nú er komið fram, at hann 10. november í fjør – tveir mánaðir eftir at bankin fór av knóranum – seldi milliónavilla til konu sína fyri lúsa 100 dollarar – umleið 582 krónur. Húsið í Florida hevði hann keypt í 2004 fyri eina heilt aðra upphædd, nevniliga 78 milliónir krónur. Í 2007 fekk Fuld eina ársløn upp á heilar 128 milliónir krónur, skrivar epn.dk.

beinini og kravdu at fáa 85% av eini eykakvotu av makreli, sum teir hildu, at Noreg og Føroyar skulu býta ímillum sín norðanfyri 62 stig.

Strandalond í makrelavtaluni eru í løtuni Føroyar, Noreg og ES, men við tað, at ES hevði tillutað sær eina eykakvotu upp á 35.000 tons sunnanfyri 62 stig, lá tað í luftini, at Føroyar og Noreg eisini kundu tillutað sær eina eykakvotu norðanfyri 62 stig.

- Noreg legði út við, at henda eykakvota skuldi vera 35.000 tons, og av hesum skuldu teir hava 85%, meðan føroyski parturin bert skuldi vera 15%.



### Eingin bøn…

Jacob Vestergaard sigur, at norðmenn løgdu hart út og søgdu, at fekst henda marelavtala ikki í lag, var eingin fiskiveiðisáttmáli galdandi millum londini yvirhøvur.

- Vit kundu ikki góðtaka hetta býtið av eykakvotuni, men løgdu út við, at hesin spurningur kundi loysast fyri seg, kanska undir seinni samráðingum.

Men norðmenn vóru hvørki at høgga ella stinga í, og tískil endaðu samráðingarnar úrslitaleysar.

- Hóast vit stutt fyri jól høvdu gjørt avtalu við norðmennn um, at flakatolararnir kundu fara eystureftir í norskan sjógv upp á fiskiveiðiavtaluna fyri 2009, góvu norðmenn eftir slitið í samráðingunum føroysku skipunum boð um at fara úr norskum sjógvi ein ávísan klokkutíma, sigur landsstýrismaðurin.

### Seta út í kortið

Jacob Vestergaard heldur, at norðmenn hava verið rættiliga torførir at samráðst við hesaferð, og hann torir slett ikki at meta um, hvat úrslitið av hesi fiskiveiðitrætu millum londini verður.

- Nú mugu vit í fyrsta lagi seta út í kortið her heima, hvørji okkara krøv skulu verða, og hvussu vit annars hugsa okkum, at trætan verður loyst, sigur landsstýrismaðurin.

*Enn røkist einki fyri, at føroysku flakatrolararnir sleppa í norskan sjógv at royna. Tá teir fóru úr Føroyum, var ein greið avtala við norðmenn um, at teir kundu fiska av kvotuni fyri 2009*

# í norskum sjógvi

at føroysku flakatrolararnir eru riknir úr norskum sjógvi, hóast ein avtala fyrilá millum londini, tá skipini fóru úr Føroyum, og nøkur teirra longu vóru byrjað at fiska í norskum sjógvi.

- Jú, hetta kemur ógvuliga dátt við. Flakatrolararnir royna nú í gráu leiðini, men fiskiskapurin er einki at tosa um, tí hetta er ikki tíðin á hesum leiðum.

### Minkar burturav

Anfinn Olsen vísir á, at hetta er tíðin, tá flakatrolararnir plaga at royna út fyri Lofoten, har gýtingartoskurin savnast um hesa tíðina.

- Hesin túrurin plagar at roynast, og tí er hetta ein ómetaliga keðilig støða. Fyri hesi skip er ógvuliga umráðandi, at tey sum skjótast sleppa í norskan sjógv at royna. So hvørt, sum dagarnir ganga, minkar burtur av tí góðu tíðini, leggur reiðarin aftrat.



*- Hetta kemur ógvuliga dátt við. Flakatrolararnir royna nú í gráu leiðini, men fiskiskapurin er einki at tosa um, tí hetta er ikki tíðin á hesum leiðum, sigur Anfinn Olsen, reiðari*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*